Eysturskúlin 16/6-26

Góðu foreldur og næmingar

Nú er summarfrítíðin í hondum og 4.flokkur er liðugur, so fari eg at takka fyri meg sum flokslærara hjá 4.a. Eg fari komandi ár aftur í grunddeildina, í komandi 1.b og komandi 2.b. Møguliga komi eg at hava onkran tíma í 5.flokki, men hetta er ikki avgjørt enn.

Tað er ikki sørt sorgblítt at fara frá hesum ómetaliga fitta flokki, sum eg havi verið saman við dagliga, síðani tey byrjaðu í 1.flokki. Tey vera í góðum hondum, nú tey fara í 5.flokk. og teir lærarar, sum fara at hava tey komandi ár, gleða seg til at vera lærarar hjá einum góðum flokki við nógv ymiskum børnum við einum góðum felagsskapi.

Tykkum foreldrum fari eg at takka fyri eitt gott samstarv hesi árini. Tað hevur verið sera gott at vera lærari hjá so fittum børnum og stuðlandi foreldrum.

Blíðar heilsur
Guðrun